átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið



*Hesa vikuna:*
**Jógvan Zachariasen, Hoyvík**

## Læra at verja einleikan

**Í Esaiasi 6:3** lesa vit um, hvussu serafar kunngjørdu dýrd Guds, tá ið teir søgdu: „Heilagur, heilagur, heilagur er HARRIN Gud herskaranna – øll jørðin er full av dýrd Hansara!"

Heildarmyndin av dýrd Guds kemur ikki til sjóndar bert í einari mentan – samkoma Kristusar er so ómetaliga stór og fjølbroytt um allan heimin.

Vit skulu læra at góðtaka, stuðla, virða og elska hvør annan við at verja einleikan í ymiskleikum okkara.

Tá ið vit læra hetta, fara vit at síggja heildarmyndina av dýrd Guds, og tá kunnu vit syngja við serafunum:

„Øll jørðin er full av dýrd Hansara!"

# Flestu norðmenn fara í kirkju á jólum

**Í fjør vóru í alt 6,6 mió norðmenn til gudstænastur í norsku kirkjuni. 627.000 av vitjanunum – tað er: nærum 10 % - vóru jólaaftan**



**Noreg:** Hóast 6,6 mió vitjandi kann metast sum eitt høgt tal, vísa hagtølini kortini at talið er minkandi.

Statistisk Sentralbyrå vísir í síni frágreiðing á, at í 2005 vóru 6,7 mió til gudstænasturnar, meðan talið í fjør altso var lækkað við umleið 100.000 fólkum.

Sagt verður, at í fjør vórðu hildnar einar 1000 færri gudstænastur enn árið fyri.

- Tí er luttøkan við ta einstøku gudstænastuna rættiliga støðugt, verður sligið fast.

Um ein hyggur eftir gudstænastum sunnudagar og halgidagar, íroknað jólaaftan, fara í miðal 100.000 norðmenn til gudstænastur í norsku kirkjuni hvønn dag, tá kirkjuklokkurnar kalla fólk í kirkju.

### Minking og vøkstur

Umframt hagtølini fyri luttakarum við gudstænasturnar, kann ein somuleiðis staðfesta, at talið á teimum sum fara til altars er minkandi.

Í 2005 fóru 1,12 mió fólk til altars, meðan talið í fjør var komið niður á 1,1 mió.

Hinvegin løgdu norðmenn í alt 244 mió krónur í talvurnar, tá innsavning var undir gudstænastunum.

Verður hugt eftir talinum á doyptum og fermdum norðmonnum var hetta talið størri í fjør enn í 2005.

Hóast talið á doyptum øktist, er kortini talan um eina prosentvísa minking í mun til árið fyri. Orsøkin til hetta er, at tað vóru fleiri føðingar enn dópar hetta árið.

Í fjør vóru 74 % av øllum børnum doypt, og svarar hetta til góð 43.000 børn. Samstundis vórðu 42.587 ungdómar fermdir í kirkjuni. Hetta svarar til júst tveir triðingar av teimum ungu.

At enda kann verða nevnt, at 9600 hjún vórðu vígd í kirkjuni, ímóti 10.200 árið fyri, vísa hagtølini.

# Fýra sunnudagar um missión

**Fýra sunnudagar um árið skal missión setast á dagsskránna í donsku fólkakirkjuni. Tiltakið verður sett í verk av felagsskapinum Folkekirkens Mission eftir avtalu við donsku biskuparnar**



- Missión er eitt víttfevnt hugtak. Í roynd og veru er allir sunnudagarnir at meta sum missiónssunnudagar og allar gudstænastur missións-gudstænastur, sigur Kristen Skriver Frandsen, leiðari í Folkekirkens Mission.

Hinvegin kann tað vera eitt gott hugskot at seta missión í eitt serligt fokus við jøvnum millumbilum: Á missión í verki og í hugsan um fíggjartørvin hjá missiónini til tann einstaka og til kirkjuna, sigur hon.

Hvørt ár verða soleiðis ásettir fýra sunnudagar, har prestarnir í serstakan mun kunnu taka missión upp sum eitt evni í gudstænastuni.

Í hesum sambandi verður gjørd ein vegleiðing um egnaðar tekstir og um, hvussu ein slík gudstænasta kann skipast. Møguleiki verður sjálvandi at biðja onkran gestatalara luttaka ella send boð eftir teimum mongu felagsskapunum innan kirkjuna sum starvast innan missión.

Í 2008 verða teir fýra sunnudagarnir settir til 27. januar, 18. mai, 28. september og 23. november.

## Fyrstu atgongumerkini fóru beinanvegin

**Konsert:** Eftir at tíðindini um konsertina við Ron Kenoly og United Voices bórust, hevur áhugin fyri at ogna sær atgongumerki til konsertina verið stórur. Longu fyrsta minuttin eftir at tíðindini vóru løgd út á Portalin, vóru fyrstu atgongumerkini bíløgd, og síðani hevur verið ein javnur streymur av bíleggingum. Sum tað sær út nú, vera ikki nógv atgongumerki eftir at selja við dyrnar í Kelduni tann 19. desember, verður upplýst frá GJAMMA.

## Biðja fast hvønn týsdag

**Keldan:** Hvørt mánakvøld skipar samkoman í Skálafirði fyri felags bønarmøti. Her verður biðið fyri samkomuni, leiðsluni, Ísrael og Føroyum, men týsdag verður eisini skipað fyri serstøkum bønardøgum. Her verða betri stundir givnar at biðja fyri ávísum bønarevnum. Byrjað verður kl. 10 á morgni og halda tey á, inntil fólk fara til hús. Um fólk hava bønartørv kann hesin verður lagdur fram umvegis alnetið. Á heimasíðuni hjá samkomuni kann ein nevniliga skriva sítt bønarevni, sum tað síðani verður biðið yvir.

## Fullsett kirkja hvønn sunnudag

**Hoyvík:** Síðani Hoyvíkar kirkja varð vígd sunnudagin 4. november, hevur hon verið fullsett til hvørja einastu gudstænastu. Seinasti sunnudagar var einki undantak í so máta, tá ikki færri enn 750 fólk vóru í kirkju. Her var talan bæði um hoyvíkingar og fólk aðrastaðni frá. Nú sunnudagin fara helst nógv fólk aftur í Hoyvíkar kirkju, tá Sverri Steinhólm prædikar og eitt gentukór fer at syngja.



Sosialurin